# Posta Stamps

Føroyar

Nr. 43

Februar 2020



- H. H. Margreta drotning II 80 ár
- Europa 2020: Søguligar postrutur
- Hernaðarposthús undir 2. heimsbardaga
- SEPAC 2020: Mánadúgvur
- Postgjaldsmerki: Gomul postkort

Posta
FAROE ISLANDS




Royndarprent




# Margreta drotning II 80 ár

16. apríl 2020 verður hennara hátign Margreta II drotning 80 ár. Hennara hátign Margreta II varð fødd 16. apríl 1940 á Amalienborg, dóttir Fríðrik 9. kong og Ingrid drotning, prinsessu av Svøríki.

Margrethe Alexandrine Þórhildur Ingrid, er hennara fulla navn og hon gjørdist drotning tann 14. januar 1972 og hevur sostatt verið drotning í 48 ár.

Sjálvan føðingardagin gevur Posta út eitt smáark av drotningini. Myndevnið er almenna gávan frá Føroya Løgtingi í sambandi við at drotningin í 2012 hevði verið drotning í 40 ár. Gávan var ein málningur av drotningini, sum Edward Fuglø hevur málað.

***Fuglar og so villini djór tey vóru henni kunn***

Tað líkist einum ævintýri, eini gamlari søgn. Í vissan mun er tað eisini eitt ævintýr, ið greitt verður frá í málninginum hjá Edward Fuglø.

Eins og stevnismynd stígur drotningin fram úr føroyska landslagnum fylgd av nógvum djórum, einamest fuglum. Okkum kemur til hugs ævintýrini, har djórini hjálpa hetjuni í søguni. Tað er eisini galdandi her, sum skilst av heitinum, listamaðurin hevur givið myndini.

Heitið er eitt brot – tó eitt sindur broytt - úr fyrsta parti av Sjúrðarkvæðunum nevniliga úr Regin Smiði, *"Fuglar og so villini djór, tey vóru henni kunn"*. Í roynd og veru er tað kappin Sjúrður, ið knappliga skilir tað, sum djórini siga, aftaná at hann hevur dripið Frænarormin og leskað sær av blóði hansara. Við broytingini frá "honum" til "henni" í myndaheitinum er tað drotningin, ið her skilir djórini.



*Edward Fuglø (1965): Fuglar og so villini djór tey vóru henni kunn. 2012. Akryl, Aluminium og blaðgull á træ. 177 x 122 cm.*



*Margreta krúnprinsessa á vitjan á Tvøroyri í juni 1959 - bert 19 ára gomul. Mynd: Ritzau Scanpix.*

Fuglarnir – tjaldur, skarvur, skúgvur, álka, havhestur, æðublikur, likka, teisti, lundi, terna, súla, lomvia, kráka, ravnur, stari og spógvi - eru føroyskir fuglar. Eisini er ein veðrur og ein hara, tey einastu fýrbeintu djórini í føroysku náttúruni. Saman við fuglunum telja tey átjan, ið er talið av oyggjum í Føroyum.

Vangamyndin av drotningini er stiliserað og gylt sum á eini mynt, og soleiðis gerst hon ein ímynd sammett við tey naturalistiskt málaðu djórini. Hon er ikki bara ein persónur, men eisini ein stovnur. Tað er eisini í tí leiklutinum, at flestu føroyingar bókstavliga hitta drotningina nevniliga á myntum við hennara andlitsmynd.

Í lýsingini av drotningini er eisini hennara grøni kjóli við kappa, sum samstundis vísir til væl vallaða føroyska landslagið. Her vaksa smáar blómur, ið hoyra til føroyska planturíkið – eisini átjan í tali sum oyggjarnar. Tær stiliseraðu blómurnar eru mynstur í búnanum hjá drotningini, sum tekin um at hon hevur íklætt seg og tikið Føroyar til sín.

Men ævintýrið endar ikki her. Takkað verið teim nógvu fuglunum og vangamyndini av drotningini vísir myndin eisini til Fuglakvæðið hjá Nólsoyar Páll frá umleið 1800. Her er talan um eina ósemju millum fólkið og danska yvirvaldið í Føroyum lýst sum ein allegori við stríði millum smáfuglar og rovfuglar – har kongurin, sum ørnin, er fólksins verji.

Alt er ikki bara hugni í myndini hjá Edward Fuglø. Har er eisini rúmd fyri skemtingarsamari viðmerking. Hóast drotningin er vorðin ein partur av føroyska landslagnum, og verður fylgd av sínum trúføstu fylgisneytum, sum eru dýrini í oyggjunum, so er tað líka við at veðrurin í ríkisskjøldrinum við sínum lútandi høvdi kundi funnið upp á at givið henni eitt skump út av eggini. So hevur føroyska sjálvstýrisrørslan eisini fingið sítt.

Hóast vangamyndin av drotningini er í miðdeplinum, so er myndin hjá Edward Fuglø ikki ein andlitsmynd í vanligari merking. Tað er ein allegori, t.v.s. ein sinnismynd, ið eins og ein myndagáta letur seg lesa av sum ein frágreiðing um viðurskiftini millum drotningina og Føroyar. Á tann hátt er myndin eyðkend fyri Edward Fuglø, tí hansara list snýr seg altíð um okkurt, eins og heitið – eisini her – spælir ein avgerandi leiklut fyri at týða innihaldið.

Stílurin er figurativ popplist við íblástri frá ljósmyndum og lýsingum og við surrealistiskum lopi millum ymisk veruleikastig. Tað



*Drotningin á vitjan í Hvalba, juni 2016. Mynd: Liselotte Sabroe/Ritzau Scanpix.*

mest sjónska veruleikabrotið er avmyndanin av vangamyndini av drotningini sum stemplið á donskum myntum. Á myndini er hetta gjørt sum relieff í gyltum aluminium og fest í træplátuna á myndini. Málningurin fær hervið dám av eini kollagu sett saman av ymiskum tilfari.

Fortíð og nútíð møtast á myndini hjá Edward Fuglø. Øðrumegin ævintýr og allegori, hinumegin skemtingarsemi og nútímans list. Bæði formliga og innihaldsliga er talan um eitt stórt verk, ið á ein sniðfundigan, góðan og skemtingarsaman hátt er ein viðurkenning til drotningina sum ríkisstjóri Føroya.

*Nils Ohrt*
*mag.art. í listasøgu*




*Eitt svartprent er prentað av smáarkinum. Svartprentið fylgir ókeypis við árbókini 2020, men kann eisini bíleggjast fyri seg.*

*Svartprentið er talmerkt og er upplagið 1.500 eintøk - harav tey 400 verða seld fyri seg. Støddin er 10 x 7 cm. Prísur: 150,- kr.*







Royndarprent

# Europa 2020: Søguligar postrutur




Postruturnar í Føroyum hava altíð verið truplar. Leiðin gekk ofta yvir illgongd fjøll og svikalig sund – og stundum var beinleiðis vandi á ferð.

**Postrutan: Klaksvík – Viðareiði**

Ein av ringastu farleiðunum yvir land var ferðin úr Klaksvík til Viðareiðis og heim aftur - har postmaðurin skuldi tvørturum eitt tað mest torgingna fjallalendið í landinum.

**Jákup Post dettur oman**

Tann 24. novembur 1887 fór fyrsti postmaðurin í norðoyggjum, Jacob Eliassen (1836 – 1887) úr Klaksvík til Viðareiðis við posti. Hóast veðrið var gott, var frost og kavi í fjøllunum. Jákup Post, ella Jakke í Vági, sum hann eisini kallaðist, kom ikki vegin fram. Menn fóru at leita og dagin eftir funnu teir hann deyðan í brøttu líðini norðanfyri Árnafjørð. Tað gjørdist greitt, at Jákup Post hevði høgt sær slóð í harða kavan niðan móti skarðinum "Uppi við Gjógv", men hevði mist fótafestið og varð gliðin uml. 350 metrar oman brekkuna – og á vegnum farin út av einum hamri, uml. 19 metrar høgur.

Á kortinum er rutan hjá Jákup Post merkt við gulum.

**Postmenninir á fjallinum**

Evnisvalið til 17kr-frímerkið er tó frá einum øðrum tilburði á somu farleið. Nøkur ártíggjund eftir vanlukkuna hjá Jákup Post, komu tveir postmenn illa fyri á somu farleið. Teir høvdu verið á Viðareiði við posti og vóru nú ávegis til Klaksvíkar aftur. Annar teirra, Jacob Vitalis, Jakke í Krotugrøvini, segði í 1971 frá tilburðinum.

Tá teir vóru komnir niðaná omanfyri Norðtoftir og skuldu leggja oman til Árnafjarðar, kom illveður á teir við vindi og kavaroki. Komnir til Breytarstígar, var teimum greitt, at teir ikki vóru førir fyri at taka seg oman til Gjónna – myrkt var og nógvur skalvur. Teir fingu klórað seg niðan í eina urð nærhendis, har teir laðaðu eitt skýli av grótinum. Men náttin var køld og vindurin nógvur, so fyri ikki at frysta í hel, rivu teir skýlið niður og laðaðu tað upp aftur, ferð eftir ferð. Og soleiðis gekk náttin – teir laðaðu grót og bardust viðhvørt fyri at fáa hita í kroppin. Í lýsingini, tá teir aftur sóu fram fyri seg, løgdu teir á at grava seg oman av fjallasíðuni - og lesa hvønn annan niður av brattastu støðunum við línu, teir høvdu við sær, til teir at enda komu oman til Árnafjarðar.



*Staðið har teir báðir postmenninir lógu fastir. Teir vóru komnir gjøgnum Breytarskarð, ovast til høgru. Grótið niðast á myndini er partur av urðini, har teir stápladu skýli fyri at bjarga lívinum. Haðani skuldu teir ganga eftir bróttu fjallasíðuni, inn á botn. Mynd: Pól Sundskarð.*

Á kortinum vísir reyða strikan rutuna hjá teimum báðum. Her skal viðmerkjast, at teir ikki fylgdu vanligu leiðini úr Norðtoftum, men einari styttri, torførari leið, sum annars bara varð gingin á sumri. Svarta strikan vísir vanligu slóðina um fjallið.

**Postleiðin: Vestmanna – Vágar**

Við fyrra aldarmótið varð posturin til Kvívíkar, Vestmanna og Vágar borin út av postmanninum Ólavur Olsen (1855 – 1947), sum gekk úr Vestmanna til Havnar eftir posti. Heima aftur í Vestmanna, róði hann um Vestmannasund við postinum til Vágar. Vestmannasund er tiltikið fyri streym og serliga ringt at fara um, tá vindur og sjóvarfall gingu móti hvørjum øðrum.

**Postbáturin gongur burtur í 1920**

Fríggjadagin, tann 1. oktobur 1920, vóru líkindini júst soleiðis. Fitt av vindi og beint móti streyminum. Postbáturin, eitt seksmannafar við leysmotori, lendi við Sunnaru gjógv við Kvívík, har postmaðurin, sum tá var kendi fakfelagsmaðurin Hans David Niclassen (50), kom umborð.

Manning á bátinum var Johannes Jacobsen (32) og Karl Alfred Olsen (19) úr Vestmanna. Umframt postmannin var eisini eitt ferðafólk, Sofie Nattestad (27) úr Miðvági við á ferðini.

Svágur Sofiu, sum hevði fylgt henni úr Kvívík til Sunnaru gjógv, stóð á landi og eygleiddi bátin, tá hann legði á sundið. Komin umleið hálva leið til Fútaklett, hvarv báturin brádliga - allarhelst kollsigldi hann í ringa veðrinum. Svágurin boðaði frá og bátar úr Kvívík og Vestmanna fóru út at leita – men tað einasta teir funnu vóru nøkur sprek av bátinum. Øll umborð lótu lív í vanlukkuni.



*Ovast til høgru á myndini síggjast tveir fjallaknúkar. Krúnufjall til høgru og Toftaknúkur til vinstru. Vanliga gøtan gongur gjøgnum Toftaskarð millum knúkarnar. Teir báðir postmenninir vóru tó farnir gjøgnum Breytarskarð, vinstrumegin Toftaknúk – ein styttri, men illgongd leið, sum annars bara varð gingin um summarið. Longur niðri á myndini, nøkunlunda miðskeiðis, sæst ein svartur breiður hamari. Tað var oman av fjallasíðuni har, og út av hamrinum, at Jákup Post datt oman í 1887. Mynd: Pól Sundskarð.*

Ólavur Olsen var á útróðri hendan dagin, og sostatt ikki við á ferðini.

**Postbáturin "Ólavur"**

Eftir ólukkuna í 1920, var bann sett fyri at flyta post um Vestmannasund í opnum báti. Synir fyrrnevnda Ólav Olsen, Samuel Jacob (Sam) og Johan Olsen, yvirtóku postflutningin um sundið eftir faðirin. Teir høvdu deksbátin "Helgi", sum nú varð nýttur á rutuni.

"Helgi" var tó ein útróðrarbátur, so í 1939 lótu brøðurnir ein nýggjan deksbát byggja, burturav til post-, ferðafólka- og farmaflutning. Teir nevndu bátin "Ólavur" eftir pápanum.

Í 1945 byrjaði Alfred, sonur Sam Olsen, at sigla við "Ólavi" – og tá Sam doyði í 1947, helt hann fram at flyta post, ferðafólk og farm, saman við pápabeiggjanum, Johan. Seinni gjørdust eisini brøður Alfreds, Karmal og Torkil, partur av manningini á postbátinum.

Hetta var áðrenn vegasamband var millum Havnina og Vestmanna, so tá kavi var í fjøllunum, sigldi "Ólavur" ofta til Havnar eftir posti og legði at í Leynum, Kvívík og við Fútaklett á heimvegnum. Fasta rutan var annars: Vestmanna, Fútaklettur, Kvívík, Fútaklettur og Vestmanna aftur. "Ólavur" sigldi eisini til lítlu bygdina Slættanes í Vágum til seinastu fólkini fluttu av bygdini í 1964. "Ólavur" varð eisini settur inn á aðrar postrutur kring landið, tá aðrir postbátar ikki kundu sigla.

**Vanlukkan við Fútaklett**

29. desembur 1958, var Ólavur sum vanligt farin við posti og ferðafólki til Vágar. Lendingin á Fútakletti var ikki serliga vælegnað til endamálið – har var sera grunt niðurfyri og Ólavur kundi bara leggja at í kyrrindum, ella tá stilt var, orsakað av vandanum at taka botn. Teir sleipaðu tí ein minni róðrarbát við sær, sum var nýttur til at ferja fólk og farm millum deksbátin og bryggjuna.



*Postbáturin Ólavur VN 138, vágamegin, onkuntíð í fýrati- ella fimtiárunum. Legg til merkis, at hann her hevur fingið ein lítlan skúr aftan, har bukkan var.*

Tað var ókyrt hendan dagin, so Alfred og Karmal fóru í bátin við posti og farmi. Við sær útaftur, fingu teir ein ferðamann umborð á Ólav, men trý fólk stóðu eftir á bryggjuni. Tá brøðurnir róðu inn móti bryggjuni aftur, lupu tvey teirra umborð á bátin, men triðja aftraði seg. Viðkomandi gjørdi tó tekin, at hon vildi við hóast alt – og brøðurnir løgdu aftur inn móti bryggjuni. Júst tá kom eitt óløgi og lyfti bakstevnið á bátinum inn yvir kaikantin, so hann tók í bryggjuna og holvdist. Øll umborð fóru á bláman, tó dugdu tey trý ferðafólkini at svimja og fingu tikið seg út til Ólav. Men hvørki Alfred ella Karmal dugdu at svimja og komu illa fyri. Umborð á Ólavi, vildi Torkil leypa á sjógv eftir brøðrunum, men ferðamaðurin, ið fyrstur var komin umborð, helt honum aftur og kravdi, at hann setti ein enda á seg fyrst. Hetta var gjørt, Torkil leyp út og fekk bjargað Alfredi umborð á Ólav. Men onki sást til Karmal, sum seinni varð funnin druknaður í einari gjógv nærhendis. Karmal Olsen gjørdist 29 ára gamal.

20kr-frímerkið vísir postbátin Ólav umframt kort við siglingarleiðini.

**Vegir, ferjur og undirsjóvartunnil**

Fyrru helvt í sekstiárunum varð vegasambandið millum Tórshavn og Vestmanna liðugt.

Hetta setti broytt krøv til flutningin um Vestmannasund, so í 1965 varð Ólavur lagdur og ferjan "Bragd", sum eisini kundi flyta bilar, varð sett inn á rutuna í staðin. Seinni komu størri ferjur – og tá undirsjóvartunnilin millum Streymoy og Vágar lat upp fyri bilferðslu, var ferjutíðin endaligt av.

Men í Vestmanna liggur tann lítli stinni postbáturin Ólavur enn fyri teym. Vælrøktur og fult brúkiligur, hóast hann verður 90 ár í ár. Eitt virðiligt minni um farnar tíðir og ómildar postrutur.

*Anker Eli Petersen*





Royndarprent




# Bretsk hernaðarposthús í Føroyum undir øðrum heimsbardaga

Eftir at týskir hermenn tann 9. apríl 1940, gjørdu innrás og hersettu Danmark, gjørdi Stórabretland skjótt av og sendi hernaðarskip til Føroya og Íslands fyri at tryggja donsku økini í Norðuratlantshavi.

10. apríl helt Winston Churchill røðu í bretska parlamentinum, har hann vísti á, at tað var neyðugt at herseta Føroyar, tí "Føroyar høvdu stóran strategiskan týdning". Tá var Winston Churchill ikki enn vorðin krígsleiðari í Bretlandi, men var herflotamálaráðharri og hevði ábyrgd av herflotanum (Royal Navy – RN). Umframt at vilja forða fíggindanum í at nýta Føroyar, hevði RN ætlanir um at nýta tey góðu akkersplássini, sum til dømis Skálafjørðin, til síni egnu stóru herskip (Hendan ætlan gjørdist tó ongantíð veruleiki). Vegna hesar umstøður, so kom tað ikki óvart á at teir fyrstu bretsku hermenninir, sum komu til Føroya, vóru flotahermenn – landgonguhermenn frá Royal Marines. Fyrsta herdeildin var lítil, minni enn 200 lætt vápnaðir herflotahermenn komu í land í Havn tann 13. apríl 1940.

Seinast í mai vóru herflotahermenninir farnir aftur til Bretlands og í teirra stað var komin ein nakað størri herdeild, eini 500 hermenn frá Lovat Scouts, ein herdeild úr skotska hálendinum. Stutt eftir vórðu eisini aðrar herdeildir sendar til Føroya. Harímillum eitt stórt tal úr verkfrøðingaherdeildini Royal Engineers (RE) og hertøknideildini Pioneer Corps at hava eftirlit við og fremja ymisk neyðug verklagsarbeiði, umframt skotherlið frá Royal Artilleri (RA) at seta upp og røkja kanónirnar, sum skuldu verja serliga týdningarmikil pláss í Føroyum fyri sjó- og loftálopum. (Frá juni 1940 vóru Føroyar í skotmála hjá Luftwaffe, sum hevði flogstøðir í Noregi). Innsiglingin til Skálafjørðin, sum var akkerspláss hjá Royal Navy, varð vard av kanónum á Skansanum, á Strondum og á Nesi og farvegir av hesum kanónum síggjast enn á øllum trimum plássum.




Royndarprent

Á smáarkinum er ein mynd av húsunum í Miðvági, sum vórðu brúkt til hernaðarposthús. Harumframt er ein blýantstekning av hernaðarposthúsinum í Havn, sum Ingálvur av Reyni hevur teknað. Tey trý stemplini (219, 611 og 695), sum bretar brúktu í Føroyum undir 2. heimsbardaga síggjast eisini.

Vinstrumegin síggjast Lovat Scouts í skrúðgongu. Teir vóru í Føroyum frá 25. maj 1940 til 10. juni 1942. Niðanfyri síggjast ókendir hermenn frá Royal Air Force, sum arbeiddu á radarstøðini á Eiðiskolli. Radarstøðin á Eiðiskolli var ein av teimum fimm radarstøðunum í Føroyum, mannaðar av Royal Air Force undir 2. heimsbardaga.

Ein ókendur hermaður frá Lovat Scouts er avmyndaður høgrumegin. Í taskuni á bringuni hevur hann sína gassmasku. Niðanfyri er kapteynurin NMF Corbett frá Royal Navy avmyndaður. Hann var herflotayvirmaður í Føroyum frá november 1941 til mars 1945. Hann var eisini tann ovasti bretski heryvirmaðurin í Føroyum.

Longu fáar vikur eftir at bretska hermannalegan, sum fevndi um eina lítla flotahermegi frá Royal Navy upp á 175 hermenn, varð skipað í Føroyum, vóru fleiri hereindir afturat komnar til landið. Tí var tørvur á at skipa fyri tryggum og góðum postflutningi til og frá øllum hesum hermonnum. Uppgávurnar hjá verkfrøðingahermonnunum (RE) umfataðu eisini øki, sum ikki høvdu nógv við verkfrøði at gera. Av hesum kann nevnast, at teir høvdu ábyrgdina av øllum postflutningi hjá herinum. Sambært keldum, so varð hernaðarstemplið, FPO nr. 219, tann 3. mai 1940, tillutað hernaðarposthúsi Army Post Office (APO) nr. 400 til nýtslu í Føroyum. Møguliga kom stemplið til Føroya við Lovat Scouts í mai mánað, men fyrstu ferð vit vita, at tað varð brúkt, er seinast í juni, so tað kann væl vera, at tað ikki er komið til landið fyrr enn nakrar vikur seinni.




*Bretskir flotahermenn í skrúðgongu í Tórshavn tann 16. april 1940. Mynd: Danmarks Nationalmuseum.*

Tá talið av bretskum hermonnum í Føroyum var størst, vóru teir umleið 7.000 í tali. Størsti vøksturin í talinum av hermonnum kom, tá avgerð varð tikin um at gera ein flogvøll og eina støð til vatnflogfør (flying boats). Beinanvegin bretsku hermenninir komu til Føroya, fóru teir at leita eftir einum egnaðum plássi til flogvøll. At enda varð Vágar valt sum tað "minst ómøguliga plássið at gera flogvøll".

Arbeiðið upp á flogvøllin fór í gongd í 1942 og meðan hann stóð í gerð, brúkti Royal Air Force (RAF) Sørvágsvatn til vatnflogfør. Tá talið var størst, vóru uml. 3.400 hernaðarfólk í Vágum – langt omanfyri talið á fólkum, sum búðu í Vágum tá. Av hesum hermonnum komu umleið 1200 frá serdeildum hjá Royal Engineers og 2000 frá Pioneer Cops og frá august 1942 og frameftir komu eisini skothermenn frá Royal Artilleri (RA) í Vágar. Tískil var enn eitt FPO stempul - nummar 611 - tikið í nýtslu í Miðvági. Tað var formliga sett í gildi tann 21. mai 1942, sjálvt um tað møguliga hevur tikið nakrar vikur, áðrenn tað bleiv brúkt fyrstu ferð. Seinast vit við vissu kunnu siga, at tað varð brúkt, var í mars mánað 1944. Bert ein av trimum lendingarbreytum, sum ætlanir vóru um at gera, bleiv liðug. Stríðið í Norðuratlantshavi var tá so at siga vunnið, og flogførini, sum teir sameindu høvdu at ráða yvir, vóru nú betur útgjørd, og nú kundi flúgvast frá lendingarbreytum í Skotlandi og í Íslandi.

RAF Vágar helt uppat at virka í oktober 1944, og 15. desember 1944 varð flogvøllurin handaður føroysku myndugleikunum. (Sjálvt um bretar sambært bretskum keldum ikki hildu "at tað nakrantíð fór at verða nóg trygt fyri sivila flogferðslu"). Tíbetur hevur hetta víst seg ikki at vera so, sjálvt um long tíð gekk, áðrenn tað var mótprógvað. Nøkur flogfør flugu í 1946, men hetta vardi stutt og reglulig flúgving kom ikki í lag fyrr enn í 1960unum. Tá ið hugt verður afturá aftur, kann sigast, at flogvøllurin í Vágum helst er

**FPO 611 á brævi, sensurerað av R.A.F. og á brævi sent til Írlands**




*Vinstrumegin: Bjálvi við áskriftini "On active Service" og stemplaður við FPO-stempli 611, dagfest tann 21. september 1943. Brævið er sensurerað av "RAF Censor 163". Hesin sensurur er sjáldsamur. Høgrumegin: Bjálvi við áskriftini "O.A.S." (On Active Service) og stemplaður við FPO-stempli 611 (typa 2), daterað tann 20. oktober 1942. Sensurerað av "P.C.90-3017" og "4381". Sent til Írlands og er ikki vanligt. Bjálvarnir eru ogn hjá Steen Jack Petersen.*

tað mest varandi og henta, sum bretska hersetingin lat eftir seg í Føroyum.

Triðja og seinasta FPO-stemplið, sum varð brúkt í Føroyum, var nummar 695. Hetta varð brúkt í Havn frá 13. mars 1943 og fram til september 1945, tá seinastu vanligu hermenninir fóru úr Føroyum. (Ein lítil deild av Royal Navy og síðani fólki frá RAF hildu fram við at starvast á Loran-støðini á Skúvanesi í Suðuroy til seinast í 1946, tá danskir flotahermenn yvirtóku raksturin av støðini.

Tað er púra greitt, at FPO 695 skuldi koma í staðin fyri FPO 219, men tað er ógreitt hví, og tað var eitt tíðarskeið upp á fleiri mánaðir, har bæði stemplini vórðu brúkt.

Nýggjar kanningar hava ført til, at vit nú vita, hvar hernaðarposthúsini vóru og eisini eru funnar myndir av húsunum, sum tey hildu til í. Hernaðarposthúsið í Havn var í kjallaranum í húsinum á Tinghúsvegi 45 (nú nummar 49). Her búði Hans Joensen (Hansemann) við familju, og tey hildu partvís fram við at búgva í ovaru hæddini í húsinum. 35kr frímerkið vísir eina blýantstekning av húsinum, som Ingálvur av Reyni hevur teknað.

Húsini, ið vórðu brúkt til hernaðarposthús í Miðvági, vórðu bygt í 1930unum og nú er adressan Bótalsvegur 11. Familjan Hansen, sum búði har, tá bretska hervaldið yvirtók



*Uttanfyri Tinghúsveg 45. Ein bretskur hermaður saman við Hansemann og døtrum hansara. Mynd: Anita Joensen.*



*Tríggir hermenn, sum starvaðust á skrivstovuni hjá Garrison adjúdanti í Havn. Kenneth Williamson, sersjantur, í miðjuni. Vinstrumegin er Evans, sersjantur og høgrumegin er Skarn, korporálur. Williamson var við í Royal Engineers, Evans og Skarn vóru báðir við í Royal Army Service Corps. Mynd: Brian Hague.*

húsini, flutti til Leirvíkar. Ein mynd av húsinum er brúkt til 20 kr. frímerkið.

Hvussu við starvsfólkunum, sum mannaðu hernaðarposthúsini? Eitt sindur óvæntað, so funnu vit fram til ein persón, sum brúkti FPO 219-stemplið til post, ið varð sendur úr Føroyum. Kenneth Williamsson serjantur, sum var NCO í Royal Engineers, váttar í brævaskifti við ein framstandandi føroyskan frímerkjasavnara og kennara av føroyskari postsøgu, at hetta var ein partur av hansara arbeiði, frá tí at hann kom til Føroya í september 1941 og inntil einaferð árið eftir. Williamson var sera glaður fyri arbeiði sítt í Føroyum, og í síni frítíð granskaði hann føroyska mentan og nattúru. Eisini hitti hann konu sína her, og hann gjørdist ein av mongum bretskum hermonnum, sum giftust føroyskum gentum. Kenneth Williamson og Esther Rein, dóttir Niels og Hansinu Rein við Landavegin í Havn, vórðu gift í Havnar kirkju 14. mars 1944.

Eftir at hann flutti aftur til Stórabretlands skrivaði Williamsson bókina *"The Atlantic Islands: The Faeroe Life and Scene"*, sum forlagið Collins gav út í 1948. Í nógv ár var hon mett at vera tann týdningarmiklasta enska bókin um Føroyar.

*Brian Hague*



Royndarprent




# Sepac 2020: Mánadúgvur

**Díðrikur á Skarvanesi (1802-65). Mánadúgvur, umleið 1840. Gouache á pappíri, 38 x 24 cm. Ognað 1954. Listasavn Føroya.**

Marglittir standa fuglarnir har á rað hvør á síni lítlu høvd og umskarast eitt sindur. Sterkir gulir, bláir, grønir og reyðir puntar lýsa upp millum tær brúnu og svørtu fjaðrarnar. Hóast puntarnir gera eitt vakurt mynstur, síggja vit kortini, at talan er um dúgvur. Eru vit í iva, so stendur niðast á arkinum *"Maanens Duuer"* – eitt heiti, sum vísir til hugaheimin, ið dúgvurnar hoyra til.

Skroypiliga myndin á pappíri er ein av fýra myndum, og tað er einki minni enn eitt undur, at tær hava yvirlivað. Pappírsmyndirnar eru teknaðar í fyrru helvt av 19. øld og hingu upprunaliga í glas og rammu í stovuni hjá eini familju á Sandoynni. Við tíðini eru rammurnar dotnar sundur, og tá vórðu ørkini goymd í gamlari bíbil. Síðani vóru myndirnar gloymdar, til tær komu undan kavi aftur og vórðu seldar til Listafelag Føroya í 1954. Ein fimta mynd er seinni komin til Listasavnið sum ein gáva frá aðrari ættargrein í familjuni.

Tað er eisini frá familjuni á Sandoynni, at vit vita, hvør listamaðurin er, nevniliga ein ættfaðir, ið er kendur sum Díðrikur á Skarvanesi. Av aldrinum og listarligu dygdini á myndunum má hann roknast sum fyrsti føroyski listamaðurin – smá hundrað ár áðrenn hugtakið "føroysk list", við Samuel Joensen-Mikines og øðrum seinni listafólkum, gjørdist eitt hugtak.

Díðrikur á Skarvanesi (1802-65) var húskallur av Stóru Dímun, sum endaði sínar dagar á Skarvanesi. *Díðrikur í Kárastovu*, sum hann upprunaliga varð nevndur, hevur neyvan verið ein vanligur húskallur, tí í 1828 er hann í Keypmannahavn. Tað vil siga, at




*Díðrikur á Skarvanesi (1802-65). Mánadúgvur, umleið 1840. Gouache á pappíri, 38 x 24 cm. Ognað 1954. Listasavn Føroya.*

hann í fyrsta lagi kann vera farin aftur til Føroyar á vári 1829. Uppihaldið í Keypmannahavn hevur givið høvi til gitingar, um at hann skuldi hava verið næmingur á Kongaliga Kunstakademinum.

Tað eru bara tær 5 nevndu tekningarnar, ið vit hava frá Díðriki á Skarvanesi. Tær eru gjørdar í gouache, t.v.s. vatnlitur við hægri pigmentkoncentratión og einum hvítum litevni. Hetta ger litirnar dekkandi, men eisini kámari. Flestu fuglarnir á myndunum eru føroyskir fuglar, og teir munnu eisini vera málaðir í Føroyum, tí sambært fuglafrøðinginum Jens-Kjeld Jensen er ein hvítravnur við – eitt nú útdeytt fuglaslag – ið tá bert fanst her. Útbreiðslan av havhesti kann eisini geva eina ábending um tíðarfestingina av myndunum, tí hann fór ikki at eiga í Føroyum fyrr enn í 1839.

Fuglar og egg vóru tá eitt týdningarmikið føðsluískoyti, og Díðrikur skeyt sjálvur bæði fugl og savnaði saman egg, so myndevnini vóru eisini fyri hond í orðsins sanna týdningi. Soleiðis, sum fuglarnir standa í rað, minna hansara gouacher um myndatalvurnar í teim nógvu vísindaligu fuglabókunum, ið vóru útgivnar í Europa og Amerika í 18. og 19. øld. Vit vita ikki við vissu, hvar Díðrikur hevur sæð slíkar bøkur, men í tíðarskeiðnum millum 1835 og 1840 er hann húskallur hjá prestinum í Norðurstreymoy, og vit vita, at prestur var sera natúráhugaður.

Sniðið í tekningunum er kortini alt annað enn tann veruleikakenda og gjølliga lýsingin í teim vísindaligu fuglamálningunum. Ein prýðilig stílføring í ætt við ta hjá Díðriki er at finna í teimum skandinavisku almúgumálningunum, og her kundi tann svenski *Dalarhest* verið ein viðkomandi samanlíkning. Ið hvussu so er, er sniðið í tekningunum eitt



*Díðrikur á Skarvanesi (1802-65). 18 fuglar, umleið 1840. Gouache á pappíri, 39 x 27 cm. Listasavn Føroya.*

klárt prógv um, at listamaðurin ikki hevur gingið á Kunstakademinum í Keypmannahavn við tess fyrimyndum í klassisku listini. Heldur ikki er nakar Díðrikur í Kárastovu at finna á næmingayvirlitunum á akademinum.

Mánadúgvur, hvat er so tað? Í dag er ein mánadúgva ein ringdúgva ella ein skógdúgva, men sambært Jens-Kjeld Jensen var tað slagið sera sjáldsamt í Føroyum, har ongin skógur var á Díðriks døgum. Tí er heldur talan um ta nógv oftari sæddu bládúgvuna. Í mun til ringdúgvuna verpur hon bert eitt egg um mánaðin alt várið, so tað er í tí prosaiska týdninginum, at *"Maanens Duuer"* skal skiljast.

Okkurt bendir á, at Díðrikur á Skarvanesi sjálvur hevur latið seg lokkað av tí skaldsliga navninum. Á einum øðrum arki sæst nevniliga ein nógv meiri veruleikakend bládúgva. Hon mátti tó víkja fyri meiri andbornum og litføgrum skapningum í mánadúgvum.

*Nils Ohrt*
*mag.art. í listasøgu*



1) Kongabrúgvin, Eystaravág um ár 1903.



2) Fiskafólk á Rundingi um ár 1900.

Royndarprent



3) Skipafylgi í samband við kongavitjan í Havn, 1907.



4) Vestaravág og Vágsbotnur, 1930ini.

# LONDON 2020: Gomul postkort

Gomul postkort hava altíð vakt áhuga hjá fólki – kanska serliga, har ein fotomynd prýðir – hesi siga eina søgu betri enn nógv orð. Í Føroyum gjørdust postkort vanlig fyri aldamótið 1900 – m.a. kom posthús í Havn í 1870, og tær elstu fotomyndirnar nýttar á postkortunum eru frá í 1880unum, um ikki fyrr. Hóast telegrafurin og telefonin komu til landið fyrst í 20. øld, so vóru hesir samskiftishættir væl dýrari enn at senda familju, vinum og kenningum eitt postkort til jóla. Føðingardags- og samkensluheilsur vórðu eisini ofta sendar við einum postkorti. Tískil er mongdin og fjølbroytni av postkortum stórt.

**1) Kongabrúgvin, Eystaravág, um ár 1903**

Tá danakongur, Christian 9., sum tann fyrsti vitjaði í 1874, var økið, sum fekk navnið "Kongabrúgvin" fríðkað, og trappa gjørd til móttøkuna. Fyri uttan vøkru steinlaðaðu pakkhúsini hjá Jens Olsen og Jens í Dali, bygd í 1901, sæst Skansatangi. Pakkhúsini eru vekk í dag, men ein langur moli við brimverju varð gjørdur úr Skansatanga í árunum 1922-1929. Soleiðis fekk Havnin sína vernd mótvegis brimi og uppgangi – og gjørdist nærum kyrruvág. Slitnar akkersketur og skipsbrot vóru ikki óvanlig á Havnarvág fyri havnaútbyggingina – hartil knústir árabátar í uppgangi millum húsini.

Postkortið sýnir okkum gamla mynd av Havnini. Gamli kommunuskúlin frá 1894 er ikki bygdur enn. Havnar kirkja, sum var bygd "udenfor byen" í 1788, sæst her í broyttum líki eftir umbygging í 1865.

**2) Fiskafólk á Rundingi um ár 1900**

Tá einahandilin varð avtikin í 1856, vaknaði virkishugurin um alt landið. Úrslitið var fólkavøkstur, nógvar niðursetubygdir og lønandi arbeiði til fólkið. Siðbundna bóndasamfelagið fór í søguna. Menn keyptu sluppir úr Hetlandi og Bretlandi. Fyrstir at vísa lønandi fiskiskap vóru "Trappubrøðurnir" við langbummaranum "Fox" í 1872. Ein undangongumaður í royndarfiskiskapi var tó danin A.W. Skibsted keypmaður og konsul í Frederikshavn. Tað var Skibsted-fyritøkan, sum bygdi bryggju, pakkhús – og átti hetta fiskastykkið á Rundingi í Havn, har konufólk

síggjast í akkordarbeiði vaska ella breiða fisk. Í Suðurevropa var Føroya týdningarmesta útflutningsvøra í fleiri umførum skýrd “heimsins besti klippfiskur”.

Postkortið sýnir fiskastykkið *Niðri á Støð* hjá S.P. Petersen í Fuglafirði, umleið 1909.

**3) Kongavitjanin 1907, Tórshavn**

Tað var stórhending uttan samanbering, at Fríðrikur 8. kongur, Harald prinsur og fleiri danskir ráðharrar og limir av danska Ríkisdegnum vitjaðu Føroyar og teir 15.000 føroyingarnar í juli 1907. Vitjanin byrjaði í Vági, men seinni tók einasti føroyingurin í amtmansembætinum 1897-1911, Christian Bærentsen, ímóti á Kongabrúnni í Tórshavn, har Christian 9., pápi Fríðrik 8. kom í land í 1874. Havnin var stúgvandi full av fólki úr øllum landinum. Skipini í fylginum á Føroyavitjanni vóru ”Birma”, sum kongaskip, ”Atlanta” og ”Geysir”. Á vágni sæst ein flaggskrýddur “Smiril” vinstrumegin kongachaluppina, sum setti Fríðrik 8. í land.

Postkortið vísir Kongabrúnna fulla av fólki, tá kongur við fylgi kemur í land í 1907.

**4) Vestaravág og Vágsbotnur, 1930ini**

Vestaravág ella Frederiksvaag eftir danska konginum fekk stóran týdning í 1768, tá Niels Ryberg valdi Tórshavn sum fríhavn. Úr Vágsbotni varð farmur við smuglaraskipum førdur til Bretlands við stórum vinningi – hetta gav nógv arbeiði av sær til havnarfólk. Kenda húsarekkjan við Bryggjubakka er í dag ein ímynd av Havnini – bygd seint í 1920unum. Áður vóru tað fyritøkur sum hildu til her, men í dag eru tað kaffistovur og matstovur.

Postkortið er av “Thorshavns Møbelmagasin” hjá Peter Poulsen (Petur Snikk) – helst frá 1915. Petur, sum sæst standa í hurðini,

Maksimumkort:




Postkort, ogn hjá Álvi Danielsen

Tinghúsvegurin, uml. 1890




Postkort, ogn hjá Brian Hague

Fiskastykkið "Niðri á Støð" í Fuglafirði, uml. 1909




Postkort, ogn hjá Álvi Danielsen

Á Kongabrúnni, tá Fríðrikur 8. kongur vitjar, 1907




Postkort, ogn hjá Álvi Danielsen

Thorshavns Møbelmagasin hjá Petur Snikk, 1915

var snikkarin handan kenda “stólabeinsstemplið” í 1919.

*Álvur Danielsen*

# Nýggjar útgávur 16. og 27. apríl og 2. mai 2020



Royndarprent

| | |
|---|---|
| Nýggj útgáva: | **H.H. Margreta drotning II 80 ár** |
| Útgávudagur: | 16.04.2020 |
| Virði: | 50,00 kr. |
| Nummar: | FO 929 |
| Stødd, frímerki: | 40,0 x 60,0 mm |
| Stødd, smáark: | 100 x 70 mm |
| Listafólk: | Edward Fuglø |
| Prentingarháttur: | Offset + gull folia |
| Postgjaldsbólkur: | Innskrivað brøv (+ galdandi postgjald) |






Royndarprent

| | |
|---|---|
| Nýggj útgáva: | **Europa 2020: Søguligar postrutur** |
| Útgávudagur: | 27.04.2020 |
| Virði: | 17,00 og 20,00 kr. |
| Nummar: | FO 930-931 |
| Stødd, frímerki: | 56 x 27 mm |
| Listafólk: | Anker Eli Petersen |
| Prentingarháttur: | Offset |
| Prentsmiðja: | Cartor Security Printing, Frankaríki |
| Postgjaldsbólkur: | Stórbrøv innanoyggja 0-100 gr og smábrøv til útheimin 0-50 gr |

+ sjálvklistrandi hefti við 6 frímerkjum







Royndarprent

| | |
|---|---|
| Nýggj útgáva: | **Hernaðarposthús undir 2. heimsbardaga** |
| Útgávudagur: | 27.04.2020 |
| Virði: | 20,00 og 35,00 kr. |
| Nummar: | FO 932-933 |
| Stødd, frímerki: | 30 x 40 mm |
| Stødd, smáark: | 100 x 70 mm |
| Sniðgeving: | Kári við Rættará |
| Prentingarháttur: | Offset |
| Prentsmiðja: | Cartor Security Printing, Frankaríki |
| Postgjaldsbólkur: | Smábrøv til útheimin 0-50 gr og brævpakkar innanoyggja 0-500 gr. |



Royndarprent

| | |
|---|---|
| Nýggj útgáva: | **Sepac 2020: Mánadúgvur** |
| Útgávudagur: | 27.04.2019 |
| Virði: | 20,00 kr. |
| Nummar: | FO 934 |
| Stødd, frímerki: | 40 x 30 mm |
| Listafólk | Díðrikur á Skarvanesi |
| Prentingarháttur: | Offset |
| Prentsmiðja: | Phil@poste, Frankaríki |
| Postgjaldsbólkur: | Smábrøv til útheimin 0-50 gr. |









Royndarprent

| | |
|---|---|
| Nýggj útgáva: | **Postgjaldsmerki 2020: Gomul postkort** |
| Útgávudagur: | 02.05.2020 |
| Virði: | 4 x 12,00 kr. |
| Stødd, frímerki: | 55,0 x 22,5 mm |
| Myndir: | Gomul postkort - hjá Álvi Danielsen og Brian Hague |
| Prentingarháttur: | Flexoprent |
| Prentsmiðja: | Limo Labels, Danmark |
| Postgjaldsbólkur: | Innanoyggja smábrøv, 0-50 gr. |

Snið og uppsetan: Posta Stamps. Framsíðumynd: Vestaravág. Mynd: Gamalt postkort, uml. 1899. Ogn: Álvur Danielsen. Prentsmiðja: TrykTeam, Danmark


Posta Stamps
Óðinshædd 2
FO-100 Tórshavn

Tel. +298 346200
Fax +298 346201
stamps@posta.fo
www.stamps.fo


ISSN 1603-0036

/faroestamps

# Sepac 2020: Plakat og postkort

Í sambandi við Sepac 2020 frímerkjaútgávuna hava vit framleitt eina plakat og eitt postkort.

Plakatin er úr góðskupappíri, 420 x 297 mm (A3) til støddar og hevur sama myndevni sum frímerkið: *Mánadúgvur*. Bert 100 eintøk av plakatini eru prentað.

Plakatin kostar 95,00 kr.




Postkortið er 170 x 120 mm til støddar og vísir eitt av hinum listaverkunum hjá Díðriki á Skarvanesi, nevniliga "Hani og høna" frá sama tíðarskeiði.

Postkortið kostar 7,00 kr og fæst eisini sum maksimumkort fyri 27,00 kr.




**Posta Stamps luttekur á hesum framsýningum:**

Luttøka við serstempli:

**LONDON 2020,** 02. - 09. mai 2020, London, England

Luttøka uttan serstempul:

**Essen 2020,** 14.- 16. mai 2020, Essen, Týskland

Posta
FAROE ISLANDS

# Bíleggingarlepi - Posta Stamps nr. 43

| Nr. | Vøra | | Prísur DKK | Prísur Euro | Nøgd | Í alt |
|---|---|---|---|---|---|---|
| **Útgáva 16.04.2020 - Margreta drotning 80 ár - FO 929 (smáark við 1 frímerki)** | | | | | | |
| PPS010420 | Margreta drotning 80 ár, smáark óst. | * | 50,00 | 7,00 | | |
| FFT010420 | Margreta drotning 80 ár, smáark st. | ☉ | 50,00 | 7,00 | | |
| DDT010420 | Margreta drotning 80 ár, smáark dgst. | ☉ | 50,00 | 7,00 | | |
| FFU010420 | Fyrstadagsbjálvi v/smáarki | ☉ | 55,00 | 7,70 | | |
| WPBDROTNG | Margreta drotning 80 ár, svartprent | * | 150,00 | 21,00 | | |
| **Útgáva 27.04.2020 - Europa 2020: Søguligar postrutur - FO 930-931 (2 frímerki + hefti)** | | | | | | |
| PPA010420 | Europa 2020, røð óst. | * | 37,00 | 5,20 | | |
| FFG010420 | Europa 2020, røð fdst. | ☉ | 37,00 | 5,20 | | |
| DDG010420 | Europa 2020, dgst. | ☉ | 37,00 | 5,20 | | |
| PPN010420 | Frímerkjahefti, óst. | * | 111,00 | 15,50 | | |
| FFO010420 | Frímerkjahefti, fdst. | ☉ | 111,00 | 15,50 | | |
| DDO010420 | Frímerkjahefti, dgst | ☉ | 111,00 | 15,50 | | |
| FFK010420 | Fyrstadagsbjálvi v/røð | ☉ | 42,00 | 5,90 | | |
| FFL010420 | Fyrstadagsbj. v/einkultmerkjum | ☉ | 44,00 | 6,15 | | |
| FFM010420 | Fyrstadagsbjálvi v/4-bl. | ☉ | 155,00 | 21,70 | | |
| FFP010420 | Fyrstadagsbjálvi v/hefti | ☉ | 116,00 | 16,25 | | |
| PPB010420 | 4-bl, ovara marg. óst | * | 148,00 | 20,70 | | |
| PPC010420 | 4-bl, niðara marg. óst. | * | 148,00 | 20,70 | | |
| PPD000930 | Europa 2020, ark 17KR (10) | * | 170,00 | 24,00 | | |
| PPD000931 | Europa 2020, ark 20KR (10) | * | 200,00 | 28,00 | | |
| **Útgáva 27.04.2020 - Hernarðarposthús 2. heimsbardagi - FO 932-933 (smáark + 2 frímerki)** | | | | | | |
| PPS020420 | Hernaðarposthús, smáark óst. | * | 20,00 | 2,80 | | |
| FFT020420 | Hernaðarposthús, smáark st. | ☉ | 20,00 | 2,80 | | |
| DDT020420 | Hernaðarposthús, smáark dgst. | ☉ | 20,00 | 2,80 | | |
| FFU020420 | Fyrstadagsbjálvi v/smáarki | ☉ | 25,00 | 3,50 | | |
| PPA020420 | Hernaðarposthús, røð óst. | * | 55,00 | 7,70 | | |
| FFG020420 | Hernaðarposthús, røð fdst. | ☉ | 55,00 | 7,70 | | |
| DDG020420 | Hernaðarposthús, dgst. | ☉ | 55,00 | 7,70 | | |
| FFK020420 | Fyrstadagsbjálvi v/røð | ☉ | 60,00 | 8,40 | | |
| FFL020420 | Fyrstadagsbj. v/einkultmerkjum | ☉ | 62,00 | 8,70 | | |
| FFM020420 | Fyrstadagsbjálvi v/4-bl. | ☉ | 227,00 | 31,80 | | |
| PPB020420 | 4-bl, ovara marg. óst | * | 220,00 | 30,80 | | |
| PPC020420 | 4-bl, niðara marg. óst. | * | 220,00 | 30,80 | | |

* = óstemplað, ☉= stemplað

| Nr. | Vøra | | Prísur DKK | Prísur Euro | Nøgd | Í alt |
|---|---|---|---|---|---|---|
| PPD000932 | Hernaðarposthús, ark 20KR (20) | * | 400,00 | 56,00 | | |
| PPD000933 | Hernaðarposthús, ark 35KR (20) | * | 700,00 | 98,00 | | |

**Útgáva 27.04.2020 - Sepac 2020: Mánadúgvur - FO 934 (1 frímerki)**

| | | | | | | |
|---|---|---|---|---|---|---|
| PPA000934 | Sepac 2020, røð óst. | * | 20,00 | 2,80 | | |
| FFG000934 | Sepac 2020, røð fdst. | ⊙ | 20,00 | 2,80 | | |
| DDG000934 | Sepac 2020, dgst. | ⊙ | 20,00 | 2,80 | | |
| FFK000934 | Fyrstadagsbjálvi v/røð | ⊙ | 25,00 | 3,50 | | |
| FFL000934 | Fyrstadagsbj. v/einkultmerkjum | ⊙ | 25,00 | 3,50 | | |
| FFM000934 | Fyrstadagsbjálvi v/4-bl. | ⊙ | 85,00 | 11,90 | | |
| PPJ000934 | Postkort (1) | * | 7,00 | 1,00 | | |
| FFJ000934 | Maksimumkort (1) | ⊙ | 27,00 | 3,80 | | |
| PPB000934 | 4-bl, ovara marg. óst | * | 80,00 | 11,20 | | |
| PPC000934 | 4-bl, niðara marg. óst. | * | 80,00 | 11,20 | | |
| PPD000934 | Sepac 2020, ark (20) | * | 400,00 | 56,00 | | |

**Útgáva 01.05.2020 - Postgjaldsmerki, London 2020: Gomul postkort - 4 ymisk**

| | | | | | | |
|---|---|---|---|---|---|---|
| PMALONDON | London 2020, óst. | * | 48,00 | 6,70 | | |
| PMALONDCO | London 2020, Collector's Strip* | ⊙ | 75,00 | 10,50 | | |
| FMKLONDON | Fyrstadagsbjálvi v/røð | ⊙ | 53,00 | 7,40 | | |
| PPJLONDON | Postkort (4) | * | 28,00 | 3,90 | | |
| FFJLONDON | Maksimumkort (4) | ⊙ | 76,00 | 10,65 | | |
| WLONDON20 | Bjálvi við framsýningarstempli | ⊙ | 22,00 | 3,10 | | |

**Ymiskt**

| | | | | | | |
|---|---|---|---|---|---|---|
| WDUERPLAK | Mánadúgvur, plakat | | 95,00 | 13,30 | | |
| LUS002019 | Síður til lux album 2019 | | 120,00 | 16,80 | | |
| JOS002019 | Síða til jól 2019 | | 30,00 | 4,20 | | |
| LUA002019 | Lux album III v/síðum 2015 - 2019 | | 600,00 | 84,00 | | |
| | | | | | | |
| | | | | | | |
| | | ***Avgreiðslugjald:*** | **25,00** | **3,50** | **1** | **25,00** |
| | | | | **Prísur íalt:** | | |

*Virðini á postgjaldsmerkjunum í *Collector's Strip* eru 12,00, 17,00, 20,00 og 26,00 DKK.

Vinaliga fyllið út teigarnar aftanfyri! →

# Ja, takk! Eg vil fegin hava hesar vørur í hald:

| Nøgd | | | Vøra |
|---|---|---|---|
| | PPA | * | Sett av óstemplaðum frímerkjum |
| | PPS | * | Óstemplað smáark |
| | PMA | * | Sett av óstemplaðum postgjaldsmerkjum |
| | PPY | * | Ársmappa |
| | PPZ | * | Árbók |
| | PPN | * | Frímerkjahefti óstemplað |
| | FFK | ☉ | Fyrstadagsbjálvi við einum setti av frímerkjum |
| | FFU | ☉ | Fyrstadagsbjálvi við smáarki |
| | FMK | ☉ | Fyrstadagsbjálvi við einum setti av postgjaldsmerkjum |

## Gjaldshættir

☐ Upphæddin verður flutt á konto nr. 9870 4271212 hjá Posta Stamps

☐ Upphæddin skal skuldskrivast kundakonto míni

☐ **Ja, takk.** Eg ynski at bíleggingar og hald framyvir skulu gjaldast sjálvvirkandi við gjaldskortinum niðanfyri.

**Av tí at føroysku bankarnir ikki góðtaka kekkar, ber ikki longur til at gjalda við kekki**.

**Eg ynski at gjalda bíleggingina við gjaldskorti:**

Kort nr.: ☐☐☐☐ ☐☐☐☐ ☐☐☐☐ ☐☐☐☐

Fyrningardagur: ☐☐☐☐

Upphædd: ____________ Undirskrift: ____________________

Um tú ert skrásett/-ur sum kundi hjá Posta Stamps, verður tú vinarliga biðin um at upplýsa kundanummar, tá bílagt og goldið verður.

Posta Stamps
Óðinshædd 2
FO-100 Tórshavn

Tel. +298 346200
Fax +298 346201
stamps@posta.fo
www.stamps.fo

Navn: ____________________

Bústaður: ____________________

Postnr./býur: ____________________

Land: ____________________

T-postur: ____________________

Kundanummar: ☐☐☐☐☐☐☐

PS2020